# ARBEIÐSEFTIRLITIÐ

*Administration of Occupational Safety and Health*

Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands

Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo



***Skrásetingar nr.:***

**L-B003-1**


# Leiðbeining
# um
# fjarstýring av kranum v.m.

**Fyribilsreglur.**

Áðrenn Arbeiðseftirlitið kann góðkenna fjarstýringsskipan til kranar og onnur tól, skal skipanin lúka niðanfyri standandi treytir:

**1.** Frekvensurin, sum verður nýttur, skal verða góðkendur av P&T.

**2.** Feilfrekvensanalysa, viðv. útilokan av fremmandum frekvensum frá øðrum sendarum, skal fyriliggja. Kann framleiðarin ikki sjálvur gera eina góðkenda analysu av hesum, má hann fáa hana gjørda á einum góðkendum stovni, t.d. Elektronik Centralen í Danmark.

**3.** Á stýripanelinum skal verða eitt neyðsteðg. Lampa skal lýsa, tá fjarstýringin er sett til.

**4.** Burtursæð frá neyðsteðgkontaktini, skulu hinar kontaktirnar, sum ávirka stýrisskipanina, verða nullsøkjandi.

**5.** Viðv. ultraljóð- og infraljósstýring, skulu bert tær beinleiðis rættaðu strálirnar frá sendara til móttakara fáa skipanina at virka. Ansast skal eftir, at rekleksstrálir frá mótstandandi lutum, veggum v.m. ikki ávirka móttakarin.

Hesar reglur eru galdandi til nýggjar norðurlanda reglur verða settar í gildi.

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**, hin 19. februar 1988.

Eli Davidsen, stjóri (sign.)

***Lógarheimild:***

. 17, stk. 1 og stk. 2 í løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24 mai 1974 við seinni broytingum.

| *Útgivið fyrstu ferð:* | *Seinastu broytingar:* |
| --- | --- |
| **19. februar 1988** | |